VÍF-StÍF 32-14 (16-5):

# Eingin slingur í valsinum




*Sóley Mikkelsen var ikki blíð við bygdarfelagar sínar, tá VÍF tók ímóti StÍF sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kvinnuliðið hjá VÍF kennir bert eina kós. Full ferð frameftir**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Talan var um topp móti botni, tá StÍF vitjaði VÍF sunnudagin. Hóast StÍF seinastu tíðina hevur havt fleir góð úrslit at vísa á, og hóast tær júst høvdu lyft seg úr botninum við stórsigri á Sóljuni, so vóru tað helst tey fægstu – um nakar – sum roknaði við, at tær kundu gera nakað sum helst við VÍF.

### Einvegin ferðsla

Tað var eisini skjótt greitt, at her høvdu gestirnir ikki tað stóra at siga.

Eins og so nógvar aðrar, sum hava vitjað í Vestmanna seinastu tíðina, so komu strandakvinnurnar rættiliga skjótt í eitt satt ódnarveður, longu eftir fyrsta korterinum ella so, so var alt bert ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

Serstakliga Sóley Mikkelsen var hørð móti bygdarfeløgum sínum, men sum heild var tað eitt samlað VÍF lið, sum gjørdi sína skyldu móti StÍF í einum dysti, sum mest av øllum minti um eina upphiting til steypafinaluna, sum verður komandi vikuskifti.

### Gleðin er við aftur

Har er VÍF sjálvsagt favorittur at vinna, og hóast Stjørnan nú tykist vera komin úr kreppuni, sum liðið hevur verið í, so er enn meira, sum bendir á, at VÍF aftur skal ogna sær greipuna í ár.

Ikki bert hava tær nógv tann sterkasta og breiðasta hópin í landinum, men eftir Europa-Cup uppgávurnar, sum eitt skifti tóktust hava tikið alla luft úr teimum, eru fingnar aftur um bak, er tað veruliga eitt lið við spæliglæði, sum hevur umboðað VÍF seinastu dystirnar.

Júst spæligleðin er annars nakað, sum kann vera torført at hava, tá eitt lið er somikið einaráðandi, men hesa tykist VÍF so hava funnið í tøkum tíma, og so verður meira enn torført hjá nøkrum at basa teimum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-StÍF 32-14 (16-5)**
Eingin dómaraseðil komin

---

Tjaldur-H71 (35-32):

# Søguligt hjá Tjaldri

**Við sigrinum á H71 vann Tjaldur seg upp á eitt søguliga høgt fjórða pláss, og nú hómast heiðursmerkini**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Síðani Tjaldur sá dagsins ljós á øðrum sinni, hevur gingið meira enn striltið, meðan felagið hevur roynt seg í bestu deildini.

Bæði kvinnur og menn hava alla tíðina rótað í botninum, men nú tykist hetta bert at vera søga. Í øllum førum, tá tosað verður um manshondbóltin. Nú hevur Tjaldur nevnliga vunnið seg upp á fjórða pláss, og so høgt hava teir ongan tíð verið áður.

### Skiftandi

Tað var tó við bit og slit, at runavíkingar vunnu dystin á hoyvíkingum, og í øllum førum var lítið í fyrra hálvleiki, sum bendi á, at heimaliðið skuldi sigra.

Hoyvíkingar komu til runavíkar uttan ein einasta sigur í endaspælinum, men fyrra hálva tíman var líkt til, at teir ætlaðu at broyta hetta. Tað gekk leingi javnt á, men so bragdaði hjá gestunum, og teir fingu skapt eitt lítið glopp, sum tó tódnaði nakað væl undan steðginum.

Fyrstu løtuna eftir steðgin høvdu gestirnir eisini gott tak á, men so steðgaði fullkomuliga. Frá støðuni 20-20 øktu runavíkingar stútt og støðugt, til støðan var 31-23, og so mundu tey flestu halda, at sigurin var heima.

Tað mundu leikararnir eisini, tí brádliga loyvdau teir gestunum innaftur. Hoyvíkingar mest sum skoraðu eftir vild, og eftir tíggju minuttum høvdu teir minkað um munin, soleiðis at bert tvey mál vóru ímillum, tá tveir minuttir vóru eftir at leika. Tá eydnaðist tó heimaliðnum at økja aftur, soleiðis at sigurin hóast alt varð tryggjaður.

### Bronsan hómast

Sum sagt, so tryggjaði sigurin Tjaldri, at teir nú eru á fjórða plássinum í kappingini, og kanska eru heiðursmerkini als ikki so langt burturi.

Tvey stig eru upp til strandingar, sum eiga ein dyst tilgóðar, men nógv bendir á, at StÍF ikki verða so drúgvir eftir steypafinaluna. Dysturin í Vestmanna sýndi í øllum førum, at liðið kann fáa motivatiónstrupulleikar, og hesir verða neyvan minni, tá Skála fyri fyrstu ferð skal royna seg í best fótbóltsdeildini.

So er spurningurin, hvussu hetta við fótbóltinum fer at ávirka runavíkingar.



*Tjaldur er nú á fjórða plássi í kappingini, og við eitt sindur av hepni kann væl verða, at teir røkka enn longur upp*

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-H71 35-32 (14-15)**
Málskjúttar:
Tjaldur: Sverri Justinussen 12(3), Dragisa Stojovic 9, Mortan Hansen 5, Zoran Sarcevic 4(1), Jens Martin Knudsen 3, Svein í Heiðunum 1, Ken Bærentsen 1
H71: Bjarni Wardum 8(5), Jákup á Borg 6, Kristjan Petursson 6, Finnu Hansson 6(1), Halgir Dahl-Olesen 5(1), Agnar Højgaard 1
Brotskøst: Tjaldur 4, H71 10
Útvísingar: Tjaldur 6, H71 3
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen & Kristian Johansen.

---

Sóljan-VB 18-23 (10-11):

# Bronsan er nú í eygsjón

**Meðan Neistin tapti í Klaksvík, fekk VB bæði stigini á Giljanesi, og eru vágbingarnir fyri fyrstu ferð í ár veruliga á bronsukós**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyri tað mesta hevur árið í ár hjá VB verið eitt vónbrot, har vónirnar eru justeraðar alt longri niður, so hvørt sum dystirnir eru leiktir.

Longri niður enn til bronsumerkini eru vónirnar tó neyvan settar, og eftir at Neistin fyri tað mesta hevur havt takið á hesum, eydnaðist tað leygardagin VB-kvinnunum at vinna seg upp á triðja plássið eftir sigurin á Sóljuni.

Tað var eisini longu undan dystinum greitt, at skal VB hava møguleika fyri heiðursmerkjum, so var ein sigur kravið, og hesum kravið livdu tær eisini upp til, tó at tað gekk striltið eina góða løtu

Tað var nevnliga ikki fyrr enn seinasta korterið ella so av dystinum, at tað eydnaðist VB at toga seg leysat av Sóljuni. Fyrstu lítlu løtuna av dystinum sá annars ikki út til, at tær á heimaliðnum skuldu gerast somikið tungar hjá VB at syfta.

Í tráð við leiklutin sum stórfavorittur fór VB alt fyri eitt at toga frá, men so við og við komu tær á heimaliðnum alt betri við. Eitt skifti vóru tær eisini á odda, men við tveimum skjótum málum seinastu løtuna vann VB sær tó fyrimun undan steðginum.

Hóast hetta, og hóast VB royndi at fáa tak á fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, so sleptu tær á heimaliðnum ikki soleiðis uttan víðari. Fram til góðir tíggju minuttir restaðu, stóð framvegis á jøvnum, men so skrædnaði.

Seinastu løtuna vann VB so klárt sum 7-2, og so kundi tað vera tað sama, at heimaliðið hevði verið væl við. Tær høvdu enn eina ferð tapt, og liggja framvegis fastar í botninum.

Fyri VB merkti sigurin hinvegin, at tær nú veruliga hava fingið fatur í heiðursmerkjarøðini, har tær fyri tað mesta hava roynt at hildið fast í Neistanum, sum eisini tykist hava bronsumerkini í huga.

Sigurin hjá VB gjørdist ikki verri av, at Neistin samstundis tapti fyri Stjørnuni, tí hetta gjørdi, at VB togaði seg tvey stig fram um Neistan, samstundis sum tær hava ein dyst færri enn kappingarneytarnir.

Hinvegin telir tað eitt sindur niður hjá VB, at Neistin nú hevur verið bæði í Vestmanna og Klaksvík. Hesar ferðir eigur VB framvegis tilgóðar, og hóast eingi garantiir verða latin í hondbólti, so er tað mest sum víst, at her fær VB ikki stig við sær heimaftur.

Tískil er framvegis líkt til, at avgerandi dysturin um bronsuna verður tann í Havn millum Neistan og VB, og at tey bæði liðini fram til tá mugu stríðast sum frægast fyri at fáa fulla úrtøku burtur úr teimum liðum, sum eru lægri stødd á stigatalvuni.

### Dysturin í tølum

**Sóljan-VB 18-23 (10-11)**
Málskjúttar:
Sóljan: Asta Petrauskiene 9(2), Heidi Maria Akselsen 4, Marjun Johansen 3, Petra Thomassen 1, Hertha Simonsen 1
VB: Regina Radó 6(1), Leila Jespersen 5, Gurið Mortensen 4, Eyðbritt Krosslá 3, Gabriella Fekete 3(1), Sólrun Krosslá 1, Rannvá Augustinussen 1
Brotskøst: Sóljan 2, VB 4
Útvísingar: Sóljan 1, VB 1
Dómarar úr VÍF: Áki Olsen & Agnar Joensen

---



KÍF-Neistin 22-25 (13-15):

# Skjótt í gloymibókina

**Uttan stórvegis hóvasták vann Neistin útidystin móti KÍF, og soleiðis greiddu teir sína skyldu í stríðnum, har tað ræður um at fylgja vestmenningunum**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Hetta fram til kappingarársenda eru tað greiðar treytir, sum Neistin má liva við, tá teir fara á vøllin. Fyri at hava nakran møguleika at fanga oddaliðið aftur, skulu restina av dystunum vinnast, so tað var ikki tað stóra at tosa um. Dysturin móti KÍF skuldi vinnast, og í so máta varð setningurin eisini greiddur.

### Linligt

Sæð yvir ein kamb, so var dysturin í Vestmanna av tí heldur keðiliga slagnum. Kanska hevði vánaliga veðrið gjørt sítt til at doyva spæligleðina, ella kanska var tað okkurt heilt annað, sum gjørdi sína ávirkan galdandi.

Hvussu var og ikki, so gekk spælið tað mesta av tíðini ógvuliga róliga fyri seg. Hvørgin parturin tóktist hava tann heilt stóra hugin í at leggja alt ov nógv í verjupartin, og hetta gav í stóran mun lætt spæl hjá mótpartinum. Serstakliga høvdu kollfirðingar ilt við at seta seg upp, og sum ikki ein ferð máttu teir líta á, at Óla Christian ikki lat alt ov nógv fara ígjøgnum sínu megin.

At tað hóast laka verjuspælið ikki komu fleiri mál í dystinum enn tað sama, komst heilt einfalt av, at eins og liðini ikki nýttu nakra serliga orku í verjuspælinum, so tímdu tey heldur ikki at seta ferðina serliga høgt upp í álopspartinum. Bíðað varð aloftast eftir, at okkurt holið var at skjóta ígjøgnum, og so traðkaðu skjúttarnir á liðunum til, uttan at hetta tó kastaði nakra serliga úrtøku av sær.

### Høvdið var ikki við

Uttan at fara at viðgera dystin nærri, so kundi avrikið í Vestmanna bent á, at Neistin eftir ósigrarnar fyri VÍF tykist at hava fingið motivatiónstrupulleikar. Spælararnir vita nú, at hóast teir vinna alt tað, sum eftir er, so er langt ífrá víst, at teir fanga vestmenningarnar aftur, og verður hetta hugburðurin, so kann væl henda, at teir geva VÍF seinasta trumfin, longu áðrenn liðini hittast aftur.

Hinvegin kann eisini hugsast, at dysturin hesa ferð var eitt úrslit av, at Neistin um eina viku skal spæla steypafinalu. Ein dystur, sum væl og virðiliga kann bjarga teimum árið, og sum tískil fyllir meira í hugaheiminum, enn landskappingin ger í løtuni.

Harafturat so sýndi dysturin eisini, at tað tykist sum um lægru staddu liðini í deildini hava mist alla vón um at basa teimum báðu fremstu. Í øllum førum sýndu kollfirðingar ein sera lítlan vilja at gera nakað við Neistan, hóast teir í dystinum móti VÍF seinast sýndu, at tær væl kunnu gera fortreið, um tað skal vera. Kanska var eisini júst tann ósigurin somikið tungur at svølgja, at tað heldur ikki eydnaðist ta ferðina, og at leikararnir tískil hava mist vónina um, at tað ber til at fáa stig móti teimum stóru.

Kanska vóru tað tó heilt onnur viðurskifti, sum gjørdu, at dysturin bleiv sum hann bleiv, men eftir stendur so undir øllum umstøðum, at Neistin tryggjaði sær enn tvey stig í einum dysti, sum skjótt fer í gloymibókina.



*Ferðin var ikki tann stóra, tá Neistin leygardagin greiddi sína skyldu móti kollfirðingum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**KÍF-Neistin 22-25 (13-15)**
Málskjúttar:
KÍF: Kristjan Madsen 6, Iljan Topic 6, Jákup Dam 4, Regin PEtersen 3, Vagnur Johannesen 2, Durica Tomic 2(1)
Neistin: Heini Joensen 12(7), Jacob Jónsson 3, Karl Oddmar Rasmussen 3, Áki Mørk 3, John Petersen 2, Kári Mortensen 1, Hans Áki Dal-Christiansen 1
Brotskøst: KÍF 2, Neistin 8
Útvísingar: KÍF 2, Neistin 2
Dómarar úr VÍF: Ingi Olsen & Piti Negru. Hildu alla tíðina gott skil á.

---

VÍF-StÍF 32-20 (15-7):

# StÍF er í finaluni



*Tað var ikki stórvegis, sum StÍF kundi gera við Inga og teir úr VÍF hesaferð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tankarnir hjá strandingum vóru longu í steypafinaluni, tá teir sunnudagin vóru í vestmanna, har heimaliðið hevði óvanliga lætt spæl**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Longu undan dystinum móti VÍF vóru tekin um, at hetta ikki júst var tað, sum rúmaði mest í tonkunum hjá strandingum í løtuni.

Leikandi venjarin, Costin Dumitrescu, meiddi sær fingurin móti VÍF, tá finaluplássið varð tryggjað, og hóast hann tá fekk spælt dystin lidnan, so valdi hann heldur at spara seg til finaluna hesaferð.

### Lítið bit í

Eisini sálarliga tóktust strandingar at spara, tí tað gingu bert fáir minuttir, áðrenn tað varð greitt, at her skuldi tað standa VÍF á tí allarmesta.

Heimamenninir, sum vóru grammir eftir at hevna tapið í hálvfinaluni settu fulla ferð á frá byrjan, og tá hvørki strandaverjan ella –málverjin vóru upp til sítt besta, so vórðu teir revsaðir so dyggiliga.

Eftir fyrsta knappa korterið var heimaliðið á odda 8-1, men so sansaðu teir, at her fór kanska ikki at gerast eins torført, sum tað var mikukvøldið. Ferðin varð sett nakað væl niður, og strandingar sluppu tískil upp í part í spælinum á vøllinum.

Tað er væl møguligt, at um strandingar nú høvdu kent sína vitjunartíð, so kundu teir við einum gearskifti fingið eitt sindur av spenningi í aftur dystin, men hetta kom ongantíð. Partvíst tí saknurin av Costin var ov stórur, og partvíst, tí hugurin at stríðast als ikki var nóg stórur.. VÍF sat so rimmarfast á dystinum. Teir hildu alla tíðina fast, og sum tíðin leið, so gjørdist alt bara ein spurningur um, hvussu stórur sigurin skuldi verða.

### Líkjast meistarum

Umframt at dysturin bar boð um, at strandingar mest av øllum tykjast hugsa um steypafinaluna, sum verður komandi vikuskifti, so bar hetta eisini boð um, at VÍF tykist alt meira átókt einum komandi meistara.

Skal Neistin vinna vestmenningar aftur, so krevst, at VÍF missir stig móti øðrum enn Neistanum, og men ilt er at síggja, at onnur enn StÍF skulu hjálpa Neistanum í hesum. Gaman í hevur VÍF spælt javnt móti hoyvíkingum og havt tað sera strævið móti kollfirðingum, men liðið hevur hóast alt tær dygdir, sum gera, at teir eiga at vera førir fyri at avgera slíkar dystir. Eisini um liðið hevur ein ringan dag.

Einasti spurningurin tykist soleiðis vera, um strandingar kunnu skapa spenning í aftur, tá teir seinni taka ímóti vestmenningum, ella um fótbólturin tá er farin at gera ov nógv um seg á vestara armi í Skálafjørðinum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-StÍF 32-20 (15-7)**
Málskjúttar:
VÍF: Piti Negru 10(3), Ingi Olsen 7(1), Sámal Joensen 6, Agnar Joensen 4, Harald Bjørgvin 3, Ragnar Zachariasen 1, Daniel Rápa 1, Petur F. Joensen 1
StÍF: Artur Johanse 6, Andre F. Danielsen 4(1), Marius Joensen 3, Alexandur Johansen 2, Jón Rasmussen 2, Sveinur Justinussen 1, Janus Trúgvason 1, Anfinnur Joensen 1
Brotskøst: VÍF 6, StÍF 4
Útvísingar: VÍF 1, StÍF 1
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Høvdu tað í øllum førum munandi lættari enn seinast.